# Heilsufrøðingur

Heilsufrøðiskipanin søkir eftir heilsufrøðingi til skipanina. Starvið verður við fyribils setan í økinum Streymoy/Vágar, men av tí at arbeitt verður við broytingum, kunnu flytingar fara fram, og eisini kunnu t.d. tveir heilsufrøðingar røkja starvið. Talan er um eitt starv við 40 tíma arbeiðsviku, 20 tímar á smábarnaøkinum og 20 tímar á skúlaøkinum. Starvið verður sett 1. september 2005 ella eftir avtalu.

Arbeiðið er samansett virksemi við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økinum. Arbeiðið verður skipað m.a. við heimavitjan, ráðgeving, undirvísing og viðtalu. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, men til tíðir krevjandi.
Fakliga menning og skipaða supervisión.
At vera partur av samstarvstoymi.
Væntast skulu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir, í sambandi við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.
Áhugi fyri fakligari menning. Arbeiðið er skipað í samstarvstoymi, og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna kollegiala samstarvið.

Løn sambært avtalu millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bjartu Vilhelm, leiðara á Heilsufrøðiskipanini, tlf. 354010.

**Umsóknarfreistin er mánadagin 18. juli 2005.**
Umsókn við prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

## Heilsufrøðiskipanin

N. Finsensgøta 28
Postboks 132
110 Tórshavn

*Arbeiðið hjá heilsufrøðinginum er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva/vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at gera reglugligar funktiónskanningar, samtala við børn, bæði persónligar, bólka-samrøður og undirvísing.*

FAROE UNITED seafood

# Maskinmaður

Faroe Seafood søkir eftir maskinmanni til virkið í Vági at byrja beinanvegin.

United Seafood Vágur framleiður serliga tosk og upsa og í næstum gullaks. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigið og fevna um m.a. saltúrdráttir og frystar gullaksaúrdráttir. Arbeiðið á virkinum fer fram sambært innaneftirlitsskipan.

**Uppgávurnar hjá maskinmanninum verða m.a.:**
- Røkja maskinur á virkinum
- Røkja viðlíkahaldsætlan virkisins

**Krav er at umsøkjari hevur:**
- Royndir frá líknandi arbeiði.

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt virki í menning
- Eitt fakligt umhvørvi
- Løn sambært avtalu

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í einum mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 1. juli 2005.

Um áhugi er fyri hesum starvi so kunna tygum taka samband við :

## United Seafood Vágur

att : Jóan Petur Kjærbo.
Postboks 139 · FO - 900 Vágur
Telefon á virkinum : 373700
Fartelefon. 598520
Telefax : 373704

# P/f TJALDUR

## (fyrr p/f Skipafelagið Føroyar)

### Útgjalding av vinningsbýti

Á aðalfundi 30. mai 2005 varð samtykt at gjalda vinningsbýti til partaeigararnar. Vinningsbýtið er 100% av partapeninginum, t.e. kr. 5.050.000.

Fyri at tað skal verða møguligt at gjalda út, er neyðugt, at hvør einstakur partaeigari letur okkum hesar upplýsingar skrivliga:

**Navn á eigara, P-tal og kontonummar**
**í peningastovni (evt. tlf. nr)**
**Litra og nr. á partabrævi**

Tey flestu partabrøvini eru frá 1920'unum, og sambært viðtøkur felagsins skulu eigaraskiftir vera váttað av nevndini.

Á aðalfundi 30. mai 2005 vóru viðtøkurnar broyttar soleiðis, at partabrøvini hereftir frítt kunnu verða seld. Men framhaldandi skal sigast frá, tá partabrøv skifta eigara, so at vit kunnu dagføra partaeigaraskránna so hvørt.

Einans tey, sum eru skrásett sum eigarar, kunnu fáa útgoldið vinningsbýti og luttaka á aðalfundi.

Felagið, sum áður æt p/f Skipafelagið Føroyar, broytti í 2004 navnið til p/f Tjaldur.

Gerið so væl at skriva til:

**P/f TJALDUR**
teldupostadressa: STATUS@POST.OLIVANT.FO
Postrúm 250
700 Klakksvík

# Toyota Corolla Stw. diesel



árg. 1996, Km 131.000· Bilurin er í sera góðum standi

**Kr. 67.000,-** tlf. 595800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Býarbókasavnið

Á bókasavninum er eitt savn av ljóðbókum á føroyskum og donskum og eitt savn av DVD-filmum.

Tríggjar teldur eru til internet og ein telda er til fólk at skriva á.

- onnur leys støðv?
Hyggið á
www.torshavn.fo

## Skrivstovufólk til Býarbókasavnið

Á Býarbókasavninum er eitt hálvtíðarstarv sum skrivstovufólk leyst at søkja frá 18.august 2005 ella skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Í avgreiðsluni og á skrivstovuni.

**Setanarviðurskifti**
Arbeitt verður 2. hvørja viku. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Annu Malenu Niclasen ella Sólbrún Jensen, Býarbókasavnið, tlf. 30 20 30 ella Janus Isfeldt, Iønarfulltrúa, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. juli 2005.

# Lesið internet Sosialin !

